Tíðindabrævið
Husin&Munin
Granskingarverkætlanin fyri Økismenning
Nr. 2 2003 4. árg.

# Hvar vil ungdómurin búgva?

Nógvar føroyskar bygdir hava leingi havt fallandi fólkatal. Talan er serliga um bygdirnar á útoyggjunum, men eisini í Suðuroynni, Sandoynni og í smærri bygdunum í Norður Eysturoy eru trupulleikarnir eyðsýndir. Unga fólkið flytur burtur og fallandi fólktalið hevur nógvar trupulleikar við sær. Til dømis broytist lutfallið millum ung og gomul so við og við, soleiðis at ein alsamt størri partur av fólkinum gerast eldri fólk. Hetta hevur grundleggjandi ávirkanir á bygdina, bæði hvat viðvíkur skattainntøkum, trivnaði, bygdalívinum, og kann hetta í ringasta føri verða ein hóttan ímóti tilverugrundarlagnum hjá bygdini.

Høvuðsorsøkin til at tey ungu flyta burtur er, at tey fara undir útbúgving ella søkja sær arbeiði. Trupulleikin er ikki útbúgving, tvørturímóti. Tað er heldur ikki ein trupulleiki, at tey ungu hava stór ynski og stórar vónir til teirra framtíðarstarv. Spurningurin er, um tey hava hug at venda aftur til heimstaðið, tá tey eru flutt.

Ábendingar uppá svarið til hendan spurningin fáast í einari kanning millum føroyska ungdómin.

Spurningurin um hvar føroyski ungdómurin kundi hugsað sær at búð í framtíðini bleiv nevnliga – millum nógvar aðrar spurningar - settur í einari stórari spurnarblaðskanning, sum Granskingardepilin hevur gjørt av, hvørji ynski og tankar føroyski ungdómurin hevur viðvíkjandi útbúgvingar- og vinnuvali. Kanningin bleiv gjørd í Januar 2003 millum allar 9. flokkar í fólkaskúlanum og allar flokkarnar í síðstu árgangunum í miðnámsskúlunum (t.d. 3 g og 2hf). Inn komu 899 svar uppá spurnarbløð og svaraði hetta til um 90 % av samlaða talinum av útbornum spurnarbløðum.

**Ungdómurin í dag nógvar møguleikar**

Ungdómurin í dag hevur nógvar møguleikar at velja millum, samanborið við fyrr, viðvíkjandi arbeiði, bústað og útbúgving. Vælútbygdað vælferðarsamfelagið ger, at allir møguleikar í prinsippinum standa opnir fyri tí einstaka og fólk hava góðar møguleikar at skapa teirra egnu tilveru - uttan mun til kyn, traditiónir og familjubond. Men nógvu valmøguleikarnir gera eisini, at tann einstaki sjálvur má velja, hvat hann ella hon skal gera í framtíðini. Hetta kann gera tað ringt at taka støðu, tí øll val eru eisini eitt frával – og tankin um kanska at hava valt skeivt kann vera ringur at handfara.

Nógvu møguleikarnir hava nýggjar avbjóðingar við sær fyri føroyskar bygdir, økir og kommunur. Tí tað merkir, at tað als ikki er nøkur sjálvfylgja, at núverandi íbúgvar og serliga tey ungu eisini í framtíðini hava hug at verða búgvandi har tey búgva í dag.

Kanningin vísir, at næstan øll tey ungu (90 %) ætla at fáa sær eina førleikagevandi útbúgving, og nógv teirra mugu úr heimbygdini ella - býnum fyri at taka útbúgvingina. Ført hevur eisini verið fram, at tað er ein vansi fyri útjaðaraøkini, at ungfólk fáa sær eina útbúgving, tí tey koma ikki aftur til heimstaðin



eftir lokna útbugving. Í nógvum førum kann nakað vera um hetta, tí ofta ber ikki til at fáa starv í heimbygdini innan tað økið, sum útbúgvingin gevur førleika til. Hinvegin er tað eisini nógvastaðni soleiðis, at tað fyri ein stóran part eru ungfólk, sum hava verið burturi og tikið sær eina útbúgving, sum koma aftur til heimstaðið at røkja tey førleikakrevjandi størvini, sum eru avgerandi fyri at tað ber til at búleikast úti um landið. Hesi størv - t.d. prestar, læknar, lærarar, verkfrøðingar, námsfrøðingar - eru ofta ring at manna í útjaðaranum, og er tað tí rættiliga avgerandi, at fólk, ið hava røtur í teimum ávísu økjunum, útbúgva seg.

**Nógv ynskja at búgva í heimbygdini**

Næstan øll ung í Føroyum ætla at taka eina útbúgving. Tey ungu hava eisini rættiliga stórar vónir til, at tað loysir seg at taka eina útbúgving. Flestu teirra eru sannførd um, at hetta vil geva teimum eina betri inntøku, betri møguleikar at sleppa at arbeiða við tí, tey gjarna vilja, og betri møguleikar at sleppa undan arbeiðsloysi. Tá tey fara at velja sær eina útbúgving, vilja tey leggja dent á, at hon kann geva teimum góða inntøku, fakligar avbjóðingar og at hon er stuttlig.

Í kanningini bleiv eisini spurt um, hvørji ynski tey høvdu til teirra framtíðarstarv. Flestu teirra løgdu her dent á, at tey fingu góða løn, at starvið passaði til teirra evni og førleika, og at arbeiði gav teimum spennandi avbjóðingar. Tað sum fæst løgdu dent, var at tey kunnu: "arbeiða í heimbygdini/-økinum", meðan svarmøguleikin at "arbeiðið er samfelagsgagnligt" hevði næstlægst undirtøku. Møguleikin at arbeiða í heimbygdini tykist sostatt ikki at vera nakað, sum verður raðfest høgt. Ungdómurin hugsar fyrst og fremst um at skapa sær sína egnu persónligu tilveru – atlitini til heimbygdina og samfelagið sum heild kemur í aðru røð.

Hóast fá leggja dent á heimbygdina í útbúgvingarvalinum, so vilja nógv teirra gjarna búgva í heimbygdini. Hetta kann tykjast sum ein andsøgn, men kann eisini tulkast sum, at um tað ber til at fáa ynskini til framtíðar starvið uppfylt í heimstaðnum, so vilja nógv gjarna búseta seg har.

*framhald á síðu 3 og 4*

# Grannastevna

**Barbara Diklev**
Landsforeningen Af Landsbysamfund • www.landsbynettet.dk



# Lokalråd (staðbundnar nevndir)

Lokalråd er en samarbejdsform mellem den enkelte kommune og de små samfund, som hører til i kommunen

Siden 1990 er dette samarbejde vokset frem i mange kommuner. *Landsforeningen Af Landsbysamfund* udførte for Indenrigsministeriet en undersøgelse af udbredelse, begrundelse, system, arbejdsområder og økonomi i lokalrådene fra 2001 til 2003. Resultatet af undersøgelsen kom i 1. oplag i februar 2003. 2. oplag blev trykt i april 2003. Undersøgelsens resultater er tilgængelige på www.lal.dk/skema, hvor man selv kan studere svarene på flere måder: de enkelte svar fra alle kommuner eller den enkelte kommunes svar. Rapporten findes også tilgængelig som pdf-fil sammesteds.

234 kommuner ud af 270 blev spurgt. 71 % svarede. Da undersøgelsen sluttede, var man i 90 kommuner enten i gang med et lokalrådssamarbejde eller man ville i gang. Sådan så det ud fra kommuneside. I nogle kommuner er landsbyerne selv gået i gang med et lokalråd, uanset om kommunen er med eller ej.

**Hvorfor gør man så det ekstra arbejde, som det er at lave et nyt mødeforum for at træffe fælles beslutninger?**

Undersøgelsens motto kunne have været: »Fælles forarbejde sparer bøvl bagefter«. Samarbejde om veje til udnyttelse af muligheder, realisering af ideer og løsninger på problemer er det praktisk at tale om, inden situationen er gået i hårdknude. Derfor mottoet. På den måde kan tiden udnyttes konstruktivt til samtale inden fastlåsning. Når først beslutningerne er truffet, er det sværere at få dem ændret.

Nogle lokalråd er opstået fordi kommunen traf beslutninger hen over hovedet på de små samfund. Sådan følte de det. I Ringsted og Næstved var det skolelukninger, der skubbede samarbejdet i gang. Kommunerne var lidt langsomme til at komme med, men har nu stor gavn af at vide, hvem man skal henvende sig til for at få alle de involverede landsbyer i tale. I Herning og Horsens var det Planlægningsafdelingen, som indbød landsbyerne til samarbejde. På Mors, i Ørbæk på Fyn og i Nørager var det landsbyerne, som startede, fordi en hovedby fik mere gavn af skattepengene end de små samfund. Den situation så man i øjnene i Planlægningsafdelingen i Års kommune, og man tog initiativ til en spørgeskemaundersøgelse i alle kommunens 8 landsbyer. Resultatet derfra dannede baggrund for det samarbejde, som næste år kan fejre 10 års jubilæum.

Systemerne i lokalrådene er vidt forskellige. Indenrigsministeriet havde i sin lovgivning om frikommuneforsøg i 1990'erne en model for lokalråd med, som blev benyttet af 4 kommuner. Kun en kommune har holdt ved siden, Ejby kommune på Fyn. Den generelle holdning var, at systemet var for stift. De systemer, man siden har sat op, passer til det enkelte samarbejde. For det meste er der to repræsentanter fra hvert lille samfund. Oftest formand og et andet bestyrelsesmedlem fra borger-/landsby-/sogne-/beboer-foreningen. Foreningerne udpeger selv deres deltagere. Der er altså repræsentanter fra hvert samfund, som ikke er hovedbyen - eller som er »for store«. Man kan sige, at de små samfund ved dette samarbejde opnår at blive set og hørt. De store samfund skal nok blive husket. De små er i fare for at miste alt for meget hvis de glemmes i kommunen. Fraflytning og faldende huspriser som følge af det er med til at udhule de små og mindre samfund. Kommunerne mister indbyggere og indtjening både i form af skattekroner, men også i form af dalende handel og ringere service. Lokalrådene er stærkt medvirkende til at sikre en større grad af tilfredshed.

Arbejdsområderne, altså de opgaver, som lokalrådene udfører, kan deles i fire afdelinger:

•*Pengefordeling* - mange kommuner laver en pulje til fordeling blandt de små samfund. De står så for fordelingen til opgaver af forskellig størrelse. Det plejer ikke at give problemer - alle ved jo, at får de lidt i år, er det fordi de andre har mere brug for penge, og at turen kommer til alle.

•*Høringssvar* - alle planmæssige og andre lokale ændringer og nye tiltag sendes typisk til høring i lokalrådene. Dermed sikrer kommunerne sig, at de ved hvad lokalsamfundene mener om nye dem inden de er udført.

•*Problemløsninger* - mange landsbyer har problemer, som de trænger til kommunens hjælp med at finde løsninger på. I dette etablerede samarbejde er det let at finde den rigtige person at kontakte, også for deltagerne i lokalrådene, fordi kommunerne næsten altid har udpeget enten en ansvarlig for kommunens del af samarbejdet, en sekretær eller i hvert fald en kontaktperson, som man kan henvende sig til - og så blive vist videre til den helt rigtige person.

•*Ideer* - det er vigtigt, at kommunen stiller an med lydhørhed overfor ideer fra de små samfund, fordi ideer derfra er baseret på ekspertise i de enkelte områders muligheder for udvikling og trivsel for beboerne. Tit vil kommunerne eje viden om hvordan ideerne kan hjælpes videre, både ved hjælp af kommunens egne folk, men også ved hjælp af penge, som kan søges med kommunens hjælp. Under alle omstændigheder er det til gavn for kommunerne, at lokalbefolkningen tager aktivt del i deres samfund, så alle muligheder kan undersøges på konstruktiv måde.

Nogle landsbyer arbejder sammen, men uden formelt samarbejde med kommunen. Selv denne model er bedre end intet samarbejde. Man lærer de folk at kende, som virker som talerør for de små samfund, og begge parter, både kommune og lokalsamfund kan spare tid, hvis kontakterne udnyttes rigtigt.
De første lokale samarbejder, den bølge af lokale foreninger, der havde størrelse som de gamle sogne, opstod som reaktion på kommunesammenlægninger-

ne i 70'erne. Efter 20 års slåen fast, at dette var størrelsen på kommunerne, startede et større samarbejde så i mange kommuner. Der er ikke tvivl om at endnu flere får travlt med at etablere lokalråd, hvis de danske kommuner skal lægges sammen til endnu større enheder. Måske betyder adgang til medbestemmelse ikke så meget i vurderingen af rationaliteten i kommunesammen lægningerne for dem, der arbejder med det på landsplan, men det betyder meget for de små samfund at have en rolle at spille, og selv være medspiller i egne forhold. Kommunesammenlægningerne er ved at finde sted. På Bornholm er de fem kommuner nu en regionskommune, og Langeland vil blive en kommune. Ærø ligeså. Der hvor det er svært, er der hvor udkanterne er involveret. Øerne for eksempel. I 2002 var jeg til møde om kommunesammenlægning på Samsø. Inviteret af en lokal forening, der ville anskueliggøre hvor svært det er at lægge sammen med en ø. Overfor Samsø ligger Odder kommune på fastlandet. Derfra går færgen, og man har meget samarbejde, bl.a. om børnenes skolegang, når de tager »over« efter 7., 8. eller 9. klasse. Men fra den tilstedeværende Odder-politiker kom det helt klart: »Vi er ikke interesseret i sammenlægning med Samsø!« Hvem er så interesseret? Øerne Ærø, Samsø og Læsø har startet deres eget samarbejde - et lokalråd i virtual reality? Måske bliver det dem, der slår sig sammen? De ved i hvert fald hvad det vil sige at være udkantskommune helt derude, hvor stat og regering glemmer, at der er en del af befolkningen og landet.

Lokalrådenes største opgave er at gøre opmærksom på problemer og løsninger for de små samfund, som ikke er rationelle, men som er så vigtig en del af et helt land.

*Barbara Diklev*




*Mynd 1*

Í Mynd 1. síggja vit, at umleið 25 % hava svarað, at tey ógvuliga fegin vilja búgva í heimbygdini eftir lokna útbúgving. Harumframt vóru tað um 33 %, sum hildu, at tey gott kundu hugsað sær at búð í heimbygdini um tað bar til, t.d. viðvíkjandi arbeiði. Hetta merkir, at tað eru rættiliga nógv – um 60 % - sum kundu hugsað sær at búð í heimbygdini í framtíðini. Einans 10 % siga beinleiðis, at tey ikki kundu hugsað sær at búð í heimbygdini í framtíðini. Tað er hugvekjandi, at tað eru munandi færri gentur enn dreingir, sum hava hug at búgva í heimbygdini. Og tilsvarandi eru munandi fleiri gentur (16 %) enn dreingir (6 %), sum beinleiðis siga, at tey ikki kundu hugsað sær at búð í heimbygdini.

**Nógv ung í smærri kommunum ynskja at flyta**

Stórir munir eru á, hvussu nógv ætla sær at verða verandi burturi alt eftir, hvussu stórar kommunar eru har tey búgva. Áhugin fyri at búsetast í heimbygdini er størstur á størri plássunum – sí mynd 2. Tað eru fleiri enn 60 % av teimum ungu, sum búgva í býum við fleiri enn 2.000 fólkum, sum ynskja at búgva í heimbýnum. Hinvegin eru tað bara 47 % av teimum ungu, sum eru uppvaksin í kommunum við færri enn 200 íbúgvum, sum ynskja at búseta seg í heimbygdini. Heili 28 % av teimum, sum búgva í kommununm við færri enn 200 íbúgvum siga seg ikki kunna hugsað sær at búgva í heimbygdini/heimbýnum, tá tey eru (heilt) liðug at útbúgva seg. Hetta talið er einans 7 % millum tey, sum búgva í Havn. Tað eru sostatt munandi fleiri av teimum ungu á teimum størri plássunum, sum halda, at teirra møguleikar at liva eitt gott lív kunnu røkkast har tey búgva nú.

**Hvar vilja tey ungu búgva?**

Umleið ein triðingur av føroyska ungdóminum ivast, hvar hann ella hon vil seta búgv, tá tey eru liðug við útbúgvingina. Hetta er galdandi fyri tey ungu um alt landið – tað vil siga at eisini í teimum størri plássunum eru nógv, sum ivast í spurninginum um, hvørt tey kundu hugsað sær at búð í heimbygdini eftir, at tey hava nomið sær útbúgving.

Tað at so nógv ivast í, hvar tey vilja búgva, undirstrikar, at Føroyar eru í einari støðugari kapping við útheimin um at fáa ungar føroyingar at búgva í Føroyum og ikki aðrastaðni. Hetta er als ongin nýggj støða. Í nógv ár hevur tað – sum heild – verið soleiðis, at fleiri fólk eru flutt úr Føroyum enn til Føroya. Vitanin um, hvat hendir aðrastaðni, hevur ongantíð verið størri enn í dag, nú fólk flest dagliga fáa vitan um, hvat fyriferst rundanum okkum gjøgnum sjónvarp, útvarp og internet.

*framhald á síðu 4*




*Mynd 2*




*Mynd 3*

Á mynd 3 sæst, at meiri enn ein triðingur av øllum gentunum siga, at tær ynskja at búgva í útlandinum eftir, at tær eru lidnar at útbúgva seg. Hetta kann takast sum eitt tekin til føroyska samfelagið um, at tað ikki er nóg áhugavert fyri ein munandi part av føroyskum konufólkum. Kanska konufólk hava størri trupulleikar av teimum keðiligu síðunum við at búgva á lutfalsligum smáum plássum, sum bæði bygdirnar og býirnir í Føroyum mugu sigast at vera. Her verður hugsað um vantandi anonymitet og slatur og sleyg. Ført hevur onkuntið verið fram at t.d. bygdatilveran riggar betri til mannfólk við tað, at fleiri arbeiðsuppgávur eru til menn enn konufólk. Meginparturin av konufólkunum, sum eru í løntari vinnu, arbeiða í tænastuvinnunum. Hesi størvini eru fyrst og fremst á størri plássunum og serliga í Havn. Støðan hjá konufólkunum er tí ein serlig avbjóðing fyri menning av føroyska útjaðaranum.

### Avbjóðingin hjá útjaðaranum

Føroyskir ungdómar hava stórar vónir til framtíðina og útbúgving verður sæð, sum ein vegur at uppnáa eina langa røð av persónligum fyrimunum. Ein stórur partur av teimum noyðast at flyta fyri at taka útbúgvingina. Men tað er ikki í sær sjálvum ein trupulleiki at ungfólk flyta burtur fyri at nema sær útbúgving, tvørturímóti. Koma tey aftur, hava tey ofta við sær nýggjar førleikar, royndir og hugskot, ið eru avgerandi fyri framhaldandi lokalari menning og trivna. Spurningurin er bara um tey koma aftur. Nógv ung eru áhugaði í at búseta seg í heimbygdini, tá tey eru liðug at útbúgva seg. Tað ber til sostatt til at vinna ungdómin aftur, tá hann fer at seta búgv. Men tað setur krøv til lokala arbeiðsmarknaðin og trivnaðarpolitikkin. Tað krevur, at tey kunnu fáa eitt avbjóðandi arbeiði innan starvsøkið útbúgvingin skikkar tey til. Tað krevur, at tey kunnu fáa nakað at búgva í, fáa børnini ansaði og eitt vælvirkandi lokalt felagslív.

Fortreytirnar, ið ymsu bygdirnar og kommunurnar hava at fáa ungfólk at búseta seg har á staðnum eru rættiligir ymiskar. Nógv tey flestu førleikakrevjandi størvini eru í meginøkinum. Bestu møguleikarnar hava borgarar, ið antin búleikast har ella í bygdum, har møguleiki er at ferðast ímillum heimstaðið og arbeiðspláss í meginøkinum. Tá tunnilin til Norðoyggjar, um fá ár er liðugur, hevur størsti parturin av fólkinum – 85 % - hendan møguleikan. Og væntandi fara framhaldandi íløgur í undirstøðukervi at gera tað alsamt meiri hógligt hjá fólki at ferðast ímillum bústað og arbeiðspláss.

Fyri tey plássini, har íbúgvarnir ikki hava sama møguleika at ferðast ímillum arbeiðspláss í miðstaðarøkinum– Suðuroy, Sandoy og útoyggjarnar – eru avbjóðingarnar serliga stórar. Har er tað serliga týdningarmikið, at kommunurnar – stuðlaðar av landinum - við einum nýmótans kommunalpolitikki gera alt tað tær kunnu fyri at fáa ein so lokkandi lokalan arbeiðsmarknað, sum til ber. Framhaldandi menning av privatu fyritøkunum úti um landið er av serstakligum stórum týdningi. Og harumframt mugu teir almennu stovnarnir vera vælskipaðir og avbjóðandi arbeiðspláss, ið kunnu kappast við tilsvarandi stovnar í bæði útlandinum og aðrastaðni í Føroyum.

# Útgávur

Í ár eru givin út trý Arbeiðsrit og tvey Námsrit á Granskingardepilin fyri Økismenning. Allar útgávurnar av Arbeiðsrit og Námsrit eru í pdf-formati á heimasíðuni okkara www.region.fo

### Arbeiðsrit

Í Juni vórðu Arbeiðsrit 4/2003 og 5/2003 útgivin. Arbeiðsrit 4/2003 ber heitið Rekrutering av høgt útbúnari arbeiðsmegi til fiskivinnuna og er skrivað av Gesti Hovgaard, samfelagsfrøðingur Ph.d., og Hallberuy West, stud. scient. pol. Arbeiðsritið viðgerð millum annað spurningin um, hvat skal til fyri at fáa høgt útbúnu arbeiðsmegina til at velja sær starv innan fiskivinnuna. Eisini verða viðurskiftini millum høgt útbúnu arbeiðsmegina og fiskivinnuna greinaði, umframt at tilmæli verða gjørd um hvar og hvussu vinnan og tað almenna kann seta inn, fyri at gera fiskivinnuna til eitt áhugavert arbeiðspláss fyri tey hægst útbúnu.

Arbeiðsrit 5/2003 Ynski og tørvur á eldraøkinum í Vágum er skrivað av Dennis Holm. Talan er um eina kanning av ynskjum og tørvi á eldraøkinum í Vágum. Serliga er dentur lagdur á at kanna hvat slag av bústaði eldru ættarliðini í Vágum ynskja og hava tørv á. Kanningin og frágreiðingin er umbiðin av Felagskommununi í Vágum.

Arbeiðsrit 6/2003 Kanning av viðurskiftunum hjá apopleksiraktum í Føroyum er skrivað av Dennis Holm. Arbeiðsritið er ein lýsing av korunum hjá apopleksiraktum í Føroyum. Frágreiðingin og kanningin, sum frágreiðingin er grundað á, er umbiðin av Heilafelagnum, sum er felagið fyri apopleksi- og afasirakt í Føroyum

### Námsrit

Í februar í ár vórðu givin út tvey Námsrit, sum eru rit, ið kunnu nýtast sum undirvísingartilfar í eitt nú miðnámsog handilsskúlunum í Føroyum. Námsrit 2/2003 ber heitið Ung í Føroyum og er skrivað av Firouz Gaini, sum er Ph.D. lesandi á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetur Føroya. Námsrit 3/2003 ber heitið Fullveldislandsstýrið 1998-2002 og er skrivað av Dennis Holm.

Útgevari:
**Granskingarverkætlanin fyri Økismenning**
Jústagøta 1
**Postadressa:**
Postboks 159
700 Klaksvík
Tlf. 457744 & Fax 457743
Suðuroy: Tlf. 37 44 77
E-postur: region@region.fo
Heimasíða: www.region.fo
**Ábyrgd:** Dennis Holm og Bjarni Mortensen
**Umbróting:**
cre8 458006
**Prent:**
Hestprent